


*Terje Hagevang hevur boðað Eyðuni Elttør frá, at nýggja oljufelagið Geysir vil vera við í næsta útbjóðingarumfarinum á føroyska landgrunninum*

*Mynd: Jan Müller*

# Nýtt felag vera við í nýggju útbjóðingini á landgrunninum

**– Vit halda framvegis, at góðir møguleikar eru fyri at finna olju og gass í føroysku undirgrundini, og vit ætla at bjóða í 2. útbjóðing, sigur ein av stigtakarunum til nýggja oljufelagið Geysir**

OLJUMESSA
*Jan Müller*

**Sosialurin, Aberdeen:** Nýggja oljufelagið Geysir hevur so stórar vónir at finna olju og gass norðaliga á føroyska landgrunninum, at tað longu nú meldar út, at tað vil fegið vera við í eini nýggjari útbjóðing í Føroyum.

Hetta upplýsir Terje Hagevang, stjóri í norska felagnum Sagex Petroleum og ein av stigtakarunum til nýggja oljufelagið Geysir.

Sagex er við í norska hópinum á oljumessuni í Aberdeen í hesum døgum og hevur júst latið upp skrivstovu í Aberdeen.

Terje Hagevang, sum er ein gamal kenningur frá forkanningunum á føroyska landgrunninum sum stjóri í táverandi oljufelagnum Saga Petroleum, torir at viðganga, at hann trýr upp á eitt føroyskt oljuævintýr, eisini tú tað tykjast at vera so mong myrk skíggj á himmalinum.

Hetta upplýsti hann eisini fyri Eyðuni Elttør, landsstýrismanni, tá ið teir báðir hittust á føroyska básinum á oljumessuni í Aberdeen mikudagin.

## Atlantsmótið

– Vit hava stovnað felagið Geysir, sum hevur heimstað í Íslandi. Tað skal leggja seg eftir at leita eftir og framleiða olju á øllum Atlantsmótinum – tað vil siga við Føroyar, Írland og Hetland. Endamálið við felagnum er meira enn nakað annað oljufelag at vera oljufelag fyri Atlantsmótið burturav, sigur Terje Hagevang.

Felagið hevur tikið stig til at savna seismikk á íslendskum, føroyskum og hetlendskum øki.

– Seismikkurn vísir, at tað er góður prospektivitetur, tað vil siga at møguleikarnir fyri at finna olku og gass í hesum økinum. Hóast tað liggur nakað frammi í tíðini hava vit góða tiltrúgv til hesi øki.

Hann vísir á, at út frá royndum nógvastaðni vita vit, at hetta tekur tíð at útvikla.

## Íslendingar áhugaðir

Terje Hagevang sigur, at íslendingar eru sera fegnir um, at teir eru við at fáa Ísland við á oljukortið.

– Íslendskir myndugleikar halda, at hetta er eitt skilagott projekt. Seismiska programmið fyri Jan Mayen er tí eisini teknað upp saman við íslendsku myndugleikunum. Samrøður hava eisini verið við íslendskt vinnulív.

Sjálvur heldur Terje Hagevang, at møguleikar eru at finna olju og gass á íslendska havøkinum, eitt nú Jan Mayen.

Tá Geysir fer at søkja um lisens í 2. umfari við Føroyar, verður tað helst í samstarvi við onnur størri oljufeløg. Teir hava longu nú samband við onnur størri feløg um hetta.

## Til Føroya

Terje Hagevang, sum kennir føroysku undirgrundina væl frá kanningunum hjá Saga, sigur at tjúkku basaltfláirnar sjálvandi eru ein trupulleiki fyri seismikkin og er basaltið alt ov tjúkt koma møguligar goymslur at liggja ov djúpt til at kunna goyma olju og gass. Men har basaltið er millum lítið og til tveir kilometra tjúkt, er møguligt at fáa nakað burtur úr seismikkinum.



*Eyðun Elttør hevur tosað við fólk úr Qatar, meðan hann hevur verið á oljumessuni í Aberdeen*

Seismikkurin hjá Geysir røkkur millum Hetland og Føroyar og síðani suður eftir og norður eftir. Teir síggja fleiri áhugaverd øki og hava longu útpeikað ein stóran struktur, sum er sera lovandi, og sum minnir um bæði Ormen Lange og Ellidafundið og tilsvarandi strukturar í bretskum øki.

Terje Hagevang vísti herfyri í Sosialinum á ein stóran struktur har norðuri á Føroyaøkinum, har hann heldur góðar møguleikar verða við fyri at gera fund. 24. september fer Terje Hagevang at halda fyrilestur á Oljutinginum. Hann fer tá at greiða frá Geysir og tess ætlanum og sína hugsan um føroysku oljumøguleikarnar.



# Havnin fær nýggja park

**Kirkjumyndugleikarnir í Havn hava stórar ætlanir at gera eina kirkjupark í bønum við Vesturkirkjuna, sum skal vera liðug komandi summar. Umframt vakran urtagarð er krúnan á verkinum ein stór standmynd av Sigmundi Brestissyni, sum myndahøggarin Hans Pauli Olsen ger í sambandi við túsundárahaldið**

KIRKJUPARK
*Heini í Skorini*
*heini@sosialurin.fo*

Í sambandi við, at Føroyar hava verið kristnaðar í túsund ár, tók nevndin fyri túsundárahaldinum avgerð um, at tríggjar standmyndir skuldu gerast av Sigmundi Brestissyni, sum skulu reisast í Havn, í Skúvoy og í Sandvík. (Lesið um hetta aðrastaðni á síðuni).

Henda verkætlan er av kirkjuráðnum í Havn knýtt at eini aðrari ætlan, sum arbeitt hevur verið við í longri tíð.

– Í fleiri ár hevur ætlanin verið at gera eina sokallaða kirkjupark við Vesturkirkjuna í Havn ímóti Jóannes Paturssonargøtu og Frælsinum, og tá fyrireikararnir av túsundárahaldinum bóðu Hans Paula Olsen gera standmyndirnar av Sigmundi, hildu vit høvið vera sera gott at knýta verkætlanirnar saman og reisa Sigmund í komandi parkini, sigur formaðurin í kirkjuráðnum, Sjúrður Poulsen.



*– Bøurin við Vesturkirkjuna skal í næstum gerast um til eina hugnaliga kirkjupark, sum eftir ætlan verður liðug komandi summar, og standmyndin av Sigmundi Brestissyni verður mitt í parkini, sigur Sjúrður Poulsen, formaður í kirkjuráðnum í Havn*

## BGW í gongd beinanveg

Tað er longu avgreitt, at fyritøkan BGW í nærmastu framtíð fer í gongd at gera bøin um til nýggja perlu í Havnini, og Sjúrður Poulsen sigur, at í øllum førum er arbeiðið byrjað um tríggjar vikur.

– Pappírsarbeiðið er so gott sum avgreitt, og eftir at próstadømisráðið hevur gjøgnumgingið verkætlanina frá okkum, verður tað handað stiftstjórnini, og so skal bispur endaliga góðtaka verkætlanina, greiðir formaðurin í kirkjuráðnum frá.

## Býráðið latið tvær milliónir

Samlaða verkætlanin við parkini, uttan at standmyndin er íroknað, kostar umleið fýra milliónir. Kirkjan hevur millum tvær og hálvatriðju millión, og so hevur Tórshavnar Býráð rindað hinar báðar milliónirnar.

– Við tað at hetta er ein ætlan, sum hevur týdning fyri og fer at fríðka um býin, vildi Býráðið stuðla, og teir hava verið sera hjálpsamir.

## Ein sonn perla

Sambært Sjúrða Poulsen skal parkin eftir ætlan gerast ein sonn perla, sum eisini verður eitt ferðavitjandi stað burturav.

– Við Rættará er ætlanin at hava vatn í parkini við einum hólma, og so verða flisar lagdir sum gøtur. Umframt hetta skal fríðkast um við runnum, blomstrum og grasvølli, og krúnan á verkinum verður Sigmundur Brestisson, sum eftir ætlan skal standa mitt í parkini, greiðir Sjúrður Poulsen frá.

## Liðugt næsta summar

Formaður kirkjuráðsins sigur, at væntandi verður gullklumpurin í Havnini liðugur komandi summar.

– Standmyndirnar, sum skulu standa í Skúvoy og í Sandvík, eru á veg til landið, meðan triðja standmyndin í Havn verður tøk nakað seinni í ár, og komandi vár skuldi øll verkætlanin við Sigmundi og parkini verið liðug, sigur Sjúrður Poulsen.

Sostatt kunnu havnarfólk gleða seg til eitt lítið paradís við Vesturkirkjuna komandi summar, og vónandi verður standmyndin av blóðiga stríðsmanninum í forðum ikki so ræðandi, at allur romantiski og idylliski hugnin hvørvur…

# Sigmundur Brestisson ikki liðugur í vár

**Myndahøggarin Hans Pauli Olsen ger tær tríggjar standmyndirnar av Sigmundi Brestissyni, sum skulu reisast í Havn, í Sandvík og í Skúvoy, men sambært honum verður standmyndin í Havn ikki liðug í vár, tá kirkjuparkin eftir ætlan opnar**

LISTAVERK
*Heini í Skorini*
*heini@sosialurin.fo*

Fremsti myndahøggari okkara, Hans Pauli Olsen, er næstan liðugur við tær báðar standmyndirnar, sum skulu reisast í Sandvík og Skúvoy, men hann er ikki byrjaður at gera standmyndina, sum eftir ætlan skal reisast í komandi kirkjuparkini í Havn, og sum eisini skal vera størri.

– Tær báðar smærru standmyndirnar koma helst til Føroya í hesum árinum, men ógvuliga torført er at spáa um, nær størra standmyndin í Havn verður liðug, sigur listamaðurin Hans Pauli Olsen.



*– Tað er veruleikafjart at miða ímóti, at standmyndin av Sigmundi Brestissyni til høvuðsstaðin skal vera liðug í vár, sigur myndahøggarin Hans Pauli Olsen*

## Ikki í vár

Omanfyri á síðuni vísir formaðurin í kirkjuráðnum á, at kirkjuparkin skal vera liðug í vár, men myndahøggarin væntar ikki, at Sigmundur Brestisson, sum skal reisast í Havn, verður liðugur til ásettu tíð.

– Tað er veruleikafjart at miða ímóti, at standmyndin til høvuðsstaðin skal vera liðug í vár. Enn eru bert nakrar skitsur gjørdar, og tískil verður standmyndin helst avdúkað nakað eftir, at kirkjuparkin er opnað, sigur Hans Pauli.

Hann vísir á, at upprunaliga skuldu allar standmyndirnar vera í somu stødd, men tá hann so skeyt upp, at standmyndin í Havn kundi reisast við Vesturkirkjuna, mátti støddin hóska til umhvørvið og harvið vera størri enn tær báðar minnu til Sandvík og Skúvoy.

– Sigmundur verður nú gjørdur í fullari stødd at standa við Vesturkirkjuna, men hóast mun á bæði stødd og útsjónd er talan um eina seriu av trimum standmyndum av Sigmundi við nøkrum afturvendandi eyðkennum, t.d. einum skipi, sigur Hans Pauli Olsen.

Hinar báðar minnu standmyndirnar koma sum áður nevnt til landið í ár, men enn er ógreitt, nær tær verða avdúkaðar í Sandvík og Skúvoy.

